umhvørvisstovan

Sp/f Fixa
Heykavegur 2
100 Tórshavn

Argir hin 15. november 2019
Málsnr.: 19/00776-9
Málsviðgeri: Lena Ziskason

**Viðvíkjandi: undantikin skylduni til góðkenning**

Umhvørvisstovan (US) hevur hin 10. Sept. 2019 móttikið umsókn um umhvørvisgóðkenning frá sp/f Fixa, lakkerings og plátuverkstaður, staðsett á matr. 139o á Skarðshjalla. Umhvørvisstovan hevur eisini verið í samband við virkið og hevur móttikið meira tilfar í sambandi við málsviðgerina.

Virksemið hevur hildið til á Hálsi í Tórshavn, men hevur nú ætlanir at byggja nýggjan bygning til virksemið.

Talan er um nýbygning sum skal byggjast á matr. 139o á Skarðshjalla, og sambært byggisamtyktini er talan um eitt B8 øki, sum er lagt til vinnuvirkir. Virkini í hesum umráðisparti skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
Flokkur 4 umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey léttastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum.Virkir í hesum flokkinum eru m.a. bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.

Sambært umsókn og samskifti skal virksemið vera umvælingar av skaðum og lakkering. Virkið kann lakkera upp til 100 bilar um mánaðin. Fyribils verður kabinan frá bygninginum á Hálsi sett upp, men ein nýggj er keypt. Virksemið verður víðkað til eisini at umfata lakkering av stórum bilum og bussum. Kabinurnar hava fleiri filtur, sum tryggja at rein luft kemur inn og filtur í gólvinum, sum aftur halda bitlum frá lakkeringini. Alarmskipan er til kabinurnar, sum sigur frá nær filtrini skulu skiftast.

Nærmasta bústaðarøkið er gott 1,5 km burtur frá verkstaðnum.

Virksemið er umvælingar av skaðum og lakkering, so onki spillvatn kemur frá virkseminum innandura. Eftir at bilarnir eru umvældir og lakkeraðir, verða teir klárgjørdir og vaskaðir. Alt virksemið er innandura.

Sambært vegleiðingum í okkara grannalondum kann útlát serliga vera til luft, so sum óljóð og partiklar og lakkluktur. Tí skal slíkt virksemið staðsetast í minsta lagi 100 m frá bústaðarøki.

Sambært Løgtingslóg nr. 134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kemur hetta virksemið undir kap. 5, “Serliga dálkandi virki v.m.”. Virksemið er í fylgiskjalinum til lógina merkt við eini stjørnu, og sambært §26, 3. stk. merkir hetta, at virksemið kann verða undantikið skylduna til góðkenning, um mett verður, at tann dálking, ið virkið, fyritøkan ella útbúnaðurin vil kunna elva, hevur minni týdning fyri umhvørvið.

Umhvørvisstovan hevur tó framvegis eftirlit við virkseminum sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.
Umhvørvisstovan tekur ikki støðu til um neyðugt er við øðrum góðkenningum.

**Avgerð**
Útfrá hesum upplýsingum og móttiknu umsóknini, verður mett, at tann dálking, ið virkið elvir til í sambandi við lakkering av bilum, hevur minni týdning fyri umhvørvið.

Tí verður hervið boðað frá, at virkið hjá sp/f  Fixa staðsett á matr. 139o á Skarðshjalla, verður undantikið skylduni til góðkenning sambært §26, 3. stk. í  Løgtingslóg nr. 134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd.

Undantakið er grundað á, at virksemið er sum greitt frá í móttikna tilfarinum. Virksemið má ikki broytast ella víðkast á ein hátt, ið økir um útlátið, sum kann hava týdning fyri umhvørvið, fyrr enn góðkenning er fingin til ætlaðu broyting ella víðkan.

Vinarliga

Lena Ziskason

Avrit sent: Tórshavnar kommunu, torshavn@torshavn.fo